KÍF-H71 33-31(17-17):

# Góður endaspurtur gav KÍF tvey stig

**Tey bæði botnliðini í 1. deild hjá monnum, KÍF og H71, hittust í innanhýsis dysti í Hoyvíkshøllini leygardagin. Hóast hoyvíkingar vóru á odda ein stóran part av dystinum, eydnaðist tað kollfirðingum við einum góðum endaspurti at vinna dystin**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kollfirðingar og hoyvíkingar hava í ár verið tvey rættuliga óútroknilig lið, sum til tíðir hava gjørt ein ordans vørr og púra óvæntað tikið stig frá onkrum toppliði. Sunnudagin hittust hesi bæði liðini á felags heimavøllinum, Hoyvíkshøllini, í næstseinasta leikumfari á árinum, og í hesari botnfinaluni vóru tað kollfirðingar, ið drógu longra stráið.

### Gekk javnt á

Dysturin var rættuliga javnur. Fyrstu løtuna vóru tað hoyvíkingar, ið vóru við yvirlutan, og teir vóru á odda fyrstu tíggju minuttirnar. Kollfirðingar kom tó á javnt aftur, og tað sum eftir var av fyrra hálvleiki, vóru tað sum oftast kollfirðingar, ið vóru á odda. Serliga var tað stóri skjúttin hjá KÍF, Damir Oros, ið H71 hevði stórar trupulleikar av. Ferð aftaná ferð fór Oros upp og langaði bóltin í netið aftan fyri Levi Nybo í H71-málinum.

Kollfirðingar hinvegin høvdu stórar trupulleikar av leikandi venjaranum hjá H71, Henrik Gerster, sum skeyt heili seks mál fyri steðgin. Men eisini Heini Bentsen í høgru síðu hevði ein góðan dyst, og hann skeyt fimm mál fyri steðgin.

KÍF hevði munin ein stóran part av fyrra hálvleiki, men tá ið seinastu fimm minuttirnar komu hoyvíkingar aftur í aftur, og tað eydnaðist teimum at koma frá 13-16 upp á javnleik 17-17, áðrenn farið var til hálvleiks. Hevði H71 harafturat megnað at gagnnýtt síni brotskøst, høvdu teir óivað verið á odda í hálvleikinum, tí H71 fekk bert mál upp á eitt av sínum fýra brotskøstum í fyrra hálvleiki.



*Hoyvíkingar høvdu leingi takið, men alt endaði tó við, at KÍF fekk strítt seg til stigini, tá tey bæði niðastu liðini í bestu mansdeildini hittust*

### Endaspurturin gav KÍF stigini

Kollfirðingar fingu betru byrjanina upp á seinna hálvleik, men tað gekk ikki lang tíð, so vóru tað hoyvíkingar, ið vóru omaná. H71 legði seg á odda, tá ið eitt knapt korter var farið av seinna hálvleiki, og næstu løtuna vóru teir heilt greitt omaná. Teir fóru eitt sindur frá kollfirðingum, og tá ið einans sjey minuttir vóru eftir at leika, var H71 á odda við trimum málum, 30-27, men so steðgaði alt upp hjá hoyvíkingum.

Síðstu løtuna gjørdu kollfirðingar eitt ordans sprell, og upp á fýra minuttir høvdu teir vent frá at verða aftan fyri 27-30 til at verða á odda 31-30, og tá punkteraði ballónin hjá H71 fullkomiliga. Heini Bentsen fekk tó javnað til 31-31, men sálarliga yvirvágin var hjá kollfirðingum, og seinastu tveir minuttirnar fingu Petur Martin Poulsen og Regin Petersen skorað hvør sítt mál, meðan Óla Kristian í KÍF-málinum hevði stongt málið hjá sær, og tískil var tað KÍF, ið vann dystin 33-31.

Nú eru KÍF og H71 jøvn í stigum í botninum í 1. deild, men H71 hevur betur málúrtøku. Á seinasta leikdegi komandi leygardag, fær H71 vitjan av Neistanum í Hoyvíkshøllini, meðan KÍF skal inn á Skála at dystast við strandingar.

### Dysturin í tølum

**KÍF-H71 33-31(17-17)**

KÍF: Damir Oros 12(7), Regin Petersen 5, Gert Hansen 4, Mirko Milinkovic 3, Rógvi Weihe 3, Petur Martin Poulsen 3, Teitur Joensen 3

H71: Heini Bentsen 8, Henrik Gerster 7, Halgir Dahl-Olesen 5(1), Niels Viggo Niclasen 4, Kristian Eli Zachariassen 3, Anfinnur N. Debes 2, Johnny Durhuus 1, Eyðun Jensen 1

Brotskøst: KÍF 7(7), H71 4(1)

Útvísingar: KÍF 6, H71 3

Dómarar: Geir Wardum og Gunnar Gregoriussen

## Boccia um vikuskiftið

### Stór boccia kapping varð hildin í Gundadalshøllini leygardagin

Talan var um árligu FM-kappingarnar hjá ÍSB, og varð kappast í bólkunum fyri menningartarnað, rørslutarnað børn og rørslutarnaðum vaksnum.

Hartil var talan eisini hesaferð um tvær várkappingar, har systkin og pensionistar fingu høvi at royna seg.

Tilsamans tóku fleiri enn 100 fólk lut, og fór kappingin fram á átta vøllum. Og væl gekst at avgreiða kappingina. Byrjað varð um tíggju-tíðina um morguin, eftir at Eirikur Dam, nevndarlimur í Javna, hevði sett kappingina, og longu kl. 15.00 var klárt at fara til handanina av heiðursmerkjunum. Hesi vórðu býtt, soleiðis sum yvirlitið niðanfyri sýnir.

**FM – rørslutarnað børn**

1 Martin Kristoffur Hansen, Eiði
2 Heðin Midjord, Vágur
3 Tummas Ejdesgaard, Eiði

**FM – rørslutarnað vaksin**

1 Marius Johannesen
2 Jógvan Telling Joensen
3 Jói Ziska

**FM – Menningartarnað**

1 Theodor Esmar Hansen, Kollafirði
2 Elvin Weihe, Runavík
3 Símun Petur Zachariassen, Klaksvík

**Várkapping – systkin**

1 Benjamin Ejdesgaard, Eiði
2 Ásvør Rasmussen, Klaksvík
3 John Mortansson Haraldsen, Eiði

**Várkapping – pensionistar**

1 Havnin III: Begga, Jórun, Jenny
2 Sandur V: Óli, Niels, Kristina
3 Sandur VIII: Kolbrún, Petrina, Anna

Neistin-Kyndil 41-13 (21-5):

# Neistin smurdi Kyndil av

**Í grannauppgerðini millum bestu kvinnuliðini hjá Neistanum og Kyndil var ongantíð nakar ivi um, hvat ið var betra liðið**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Neistin hevur eitt gott kvinnulið við nógvum ungum og evnaríkum leikarum. Sunnudagin spældu tær móti grannunum úr Kyndli, ið eisini hevur eitt rættuliga ungt, men tó langt frá líka gott lið.

### Átta minuttir og 8-0

Dysturin var ikki nógv meiri enn byrjaður, so var hann avgjørdur. Neistakvinnur byrjaðu bragdliga, meðan kyndilskvinnur als ikki fingu skipað seg. Tað gekk tí heldur ikki long tíð, so hevði heimaliðið Neistin avgjørt til egnan fyrimuns. Longu eftir átta minuttir var dysturin avgjørdur, tí tá hevði Neistin skorað átta ferðir, og Kyndil hevði enn einki mál fingið.

### Nógvar hildu seg til

Neistin snøgt sagt smurdi Kyndil av sunnudagin, og Kristina Simonsen í Kyndlamálinum hevði úr at gera. Tað skal tó vera sagt beinan vegin, at tað ikki var hennara skyld, at tapið gjørdist so stórt.

Hjálparvenjarin hjá Neistanum, Flemming Raben, ið hevði ábyrgdina av liðnum hendan dystin, brúkti dystin til at lata nógvar leikarar sleppa at royna seg, og ikki kann sigast annað, enn at tær hildu seg til. Ikki færri enn seks leikarar hjá Neistanum skutu fýra mál ella fleiri, meðan tað hjá Kyndil bert eydnaðist Ann-Mari Wang at skora fleiri enn tvey mál.

Kyndil hevði ikki nógv at bjóða upp á sunnudagin, og í Kyndli eru tey óivað farin undir at fyrireika seg til komandi kappingarár, tá ið ætlanin er at gera ein størri innsats á kvinnusíðuni, Tað krevur tó, at nýtt fólk kemur til, tí hópurin er ikki nóg góður í løtuni til at bjóða sterkastu liðunum av.

Neistin hevur hinvegin eitt ungt og evnaríkt lið við nógvum góðum leikarum, og tað er lítið at ivast í, at um ungu genturnar á liðnum ikki fara av landinum, so hevur Neistin eitt lið, sum í nærmastu framtíð fer at blanda seg upp í oddastríðið í føroyskum kvinnuhondbólti. Leikarar sum Ása á Neystabø, Marjun Tróndarson og Lív Sørensen eru allar ungar og evnaríkar, og tær kunnu óivað gera Neistan til eitt topplið komandi árini.

### Dysturin í tølum

**Neistin-Kyndil 41-13 (21-5)**

Neistin: Simona Dziugyte 9(2), Marjun Tróndarson 8, Ása á Neystabø 6, Lina Andrilyte 6, Lív Sørensen 4, Susan Brockie 4, Viviann Unadóttir 3, Unn Kragesteen 1

Kyndil: Ann-Mari Wang 7(2), Linda Weihe 2, Randi Wardum 2, Sabine Frølund 1, Anja Heinadóttir 1

Brotskøst: Neistin 4(2), Kyndil 2(2)

Útvísingar: Kyndil 4

Dómarar: Kristian og Karstin Joensen - høvdu ongar trupulleikar av einari yvirkomiligari uppgávu



Bólkur 1:

# Nógv upp og niður

**Hjá B36, sum smurdi FS Vágar av, var tað bara upp, meðan KÍ og NSÍ skiftust um at vera yvir og undir**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Kappingin um Løgmanssteypið er ofta meiri venjingardystir, heldur enn steypakapping, har tað í einum og sama dysti ræður um at vinna fyri at sleppa víðari í næsta umfarið.

B36 fekk lítla dystarvenjing, tá ið FS Vágar vitjaði í Gundadali leygardagin. Styrkismunurin var alt ov stórur. B36 vann 9–0, eftir at teir í steðginum høvdu verið frammanfyri við fýra málum. Á plusssíðuni hjá B36 taldi, at fleiri ungir spælarar, sum eru uppvaksnir í felagnum, fingu høvi at royna seg.

Kenneth Jacobsen stútaði til 1–0, Jens Kristian Hansen økti til 2–0 eftir horna, Levi Hanssen var fyrstur á returbólti, og Bárður Mortansson syrgdi fyri síðsta málinum í 1. hálvleiki eftir fínt álop og innlegg frá Arnbirni Danielsen.

Eftir steðgin helt einvegisferðslan fram: John Petersen skoraði, tá ið Pól Thorsteinsson hevði spælt hann leysan, og sami maður átti næstsíðsta fótin, tá ið Bárður Mortansson økti ti 6–0. Jóhan V. Gunnarsson, sum var komin inn í vinstru, legði fleiri ferðir væl innfyri. Tað takkaði Bárður Mortansson fyri, tá ið hann økti til 7–0, og Jóhan átti eisini næstsíðsta fótin á, tá ið Tórður Hentze, sum fyri fyrstu ferð var komin á besta liðið, tá ið hann hevði loyst John Petersen av, skoraði til 8–0, og so staðfesti veteranurin Jens Kristian Hansen.



*Runavíkingar høvdu mest sum sigurin vísan, men í evstu løtu eydnaðist kortini KÍ at javna*

### Skiftust um

Meiri dystarvenjing enn teir í B36 fingu KÍ og NSÍ í Klaksvík. Fyrra partin av fyrra umfarinum spældi heimaliðið við stórari ferð. Erling Fles legði KÍ framum, eftir at Jacob Bymar hevði stungið fram ímillum, og Erling var um reppið at økja, tá ið hann lyfti upp um Jens Martin Knudsen, men bólturin rakti tvørtræið.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki fór ferðin eitt sindur úr heimaliðnum, og so átti NSÍ tørn seinna partin av fyrra og fyrrapartin av seinna umfarinum. Brynjolvur Nielsen javnaði undan steðginum. Frísparkið hjá honum nært ein av teimum í manngarðinum og snýtti Jákup Mikkelsen eitt sindur.

Eftir stegin stútaði Helgi L. Petersen NSÍ framum eftir horna og snittara frá nærra og til handara stólpan. Helgi var um reppið at økja um leiðsluna eftir horna, men bólturin tók stólpan skeivu megin.

Tá ið KÍ kom afturíaftur gekk striltið at fáa mál, men tað eydnaðist í síðstu løtu. Eftir horna og eitt sindur aftur og fram var Jacob Bymar fyrstur á, eftir at Símun Joensen hevði stútað upp á tvørs, og tað var um reppið, at KÍ fekk eitt mál afturat. Stig Edvin Aksnes sneiddi uttanvert brotsteigin framvið Jens Martini Knudsen, og tá ið hann sendi ímóti málinum rakti bólturin í ein verjuspælara. Klaksvíkingar vildu halda, at hesin hevði nýtt hondina, men dómarin, Suni Johansen, hevði ikki somu áskoðan.

**B36–FS Vágar 9–0 (4–0)**

1-0: Kenneth Jacobsen 13.
2-0: Jens Kristian Hansen 20.
3-0: Levi Hanssen 36.
4-0: Bárður Mortansson 43.
5-0: John Petersen 47.
6-0: Bárður Mortansson 60.
7-0: Bárður Mortansson 65.
8-0: Tórður Hentze 80.
9-0: Jens Kristian Hansen 89.

**KÍ–NSÍ 2–2 (1–1)**

1–0: Erling Fles
1–1: Brynjolvur Nielsen
1–2: Helgi L. Petersen
2–2: Jacob Bymar

Bólkur 2:

# Reytt til landsliðsskiparan

**Hóast TB var undirmannað tveir triðingar av dystinum, so megnaðu teir javnleik. Samstundis legði GÍ seg einsamalt á odda**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um eina botn- og eina oddauppgerð í bólki 2 um vikuskiftið.

Botnuppgerðin var á Sevmýru, har TB tók ímóti B68, og einki er at taka seg aftur í, at hetta gjørdist ein bæði spennandi og dramatiskur dystur.

Dramatikkurin kom longu í hæddina eftir góðan hálvan tíma. Eftrir nærdyst við B68-málverjan slerdi Óli Johannesen eftir pólverjanum, og so hevði Niclas á Liðarenda einki annað val enn at taka ostaskorpuna fram.

Beint eftir hetta fekk B68 so lagt seg á odda, tá Mortan Hansen ímillum fleiri TB’arar fekk tamarhald á bóltinum og prikaði í kassan.

TB fall tó ikki í fátt. Teir stríddust manniliga, og undan steðginum vunnu teir seg eisini upp á javnt, tá Martin Østergaard við einum framúr langskoti smekkaði bóltin inn um ein púra prísgivnan Jacek Przylbicki.

Seinna hálvleik var lagt upp til, at B68 skuldi seta trýst á undirmannaða heimaliðið, men hóast trýstið, so eydnaðist teimum ikki at skora. Nakrar góðar møguleikar gjørdist talan um, men TB helt alla tíðina fast, og tað eydnaðist teimum eisini at ogna sær eina stigið.

### ÍF dróg aftur svart

Í Fuglafirði tók ÍF ímóti grannunum, sum tað ikki hevur eydnast at vunnið síðani hesir komu í bestu deildina, og heldur ikki hesaferð fekk ÍF nakað á skaftið.

Fyrra hálvleik vóru tað gestirnir úr Gøtu, sum høvdu bóltin meira, men hóast hetta, so megnaðu teir ongan tíð av álvara at seta trýst á verjuna hjá ÍF.

Eftir steðgin kom Krzytof Popczynski sjálvur á vøllin, eftir at bara hevði átt leiklutin sum venjari fyri steðgin, og hetta broytti um spælið hjá GÍ.

Tað eydnaðist teimum eisini at koma á odda, tá Hans Pauli Petersen við handaru stong fekk goða tíð at beina eitt innlegg í málið, men eftir hetta stóð ÍF tó fyri tí mesta.

Teir royndu at trýsta, og fleiri møguleikar spurdust eisini burturúr, men seinasti neyvleikin var tó ikki til staðar. Trýstið gav tó eisini GÍ møguleikan fyri kontra, men tað skuldi eitt fríspark langt inni í yvirtíðini til, áðrenn dysturin varð endaliga avgjørdur.

Karsten Joensen royndi at stilla múrin rætt, men Súni Olsen hevði ikki stundir at bíða eftir hesum, og hann gjørdi tí skjótt av og sendi bóltin í tóma málið.

Sum vera man, so vóru fuglfirðingar ónøgdir um hetta, men tað hjálpti teimum tó lítið. GÍ hevur nú lagt seg á odda í bólkinum, sum teir liggja sera væl fyri til at vinna, men hinvegin er støðan hjá ÍF á ongan hátt vónleys. Komandi dysturin hjá teimum er á Sevmýru, og verður talan um fulla úrtøku her, eru eisini teir væl áleiðis.

TB-B68 1-1 (1-1)
0-1: Mortan Hansen
1-1: Martin Østerbæk

ÍF-GÍ 0-2 (0-0)
0-1: Hans Pauli Petersen
0-2: Súni Olsen

Bólkur 3:

# Hepnir meistarar

**Føroyameistararnir úr HB vóru ógvuliga hepnir at hava øll trý stigini við sær aftur av Skála leygardagin**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í bólki 2 í kappingini um Løgmanssteypið er HB stórfavorittur til at vinna bólkin, men enn hevur havnarfelagið ikki verið serliga sannførandi. Leygardagin var meistaraliðið á vitjan á Skála, og tað var ikki heilt uppiborið at HB vann 1-0 og fekk øll trý stigini.

### Brendir møguleikar

Í fyrra hálvleiki í dystinum á Skála vóru ikki teir stóru málmøguleikarnir, men skálamenn vóru minst líka ofta á vitjan í brotsteiginum hjá HB, sum meistararnir vóru í brotsteiginum hjá Skála. Tað eydnaðist tó HB at fáa einasta málið í dystinum beint fyri hálvleik. Eitt hornaspark var sent høgt innfyri, og málverjin hjá Skála, ið annars leikti ein góðan dyst, fór skeivur av bóltinum, og so var lagamanni hjá Hans á Lag við handaru stong at skalla bóltin í tóma málið til 1-0 til HB.

Eftir steðgin vóru skálamenn nógv sjónligari. Teir vóru nógv ágrýtnari og naskari enn havnarmenninir, men teir dugdu ikki at gagnnýta sínar møguleikar. Havnarliðið fekk als ikki sítt spæl at hanga saman, og tað var heilt týðuligt, at liðið ikki er samanspælt enn. Dysturin á Skála var ikki væl spældur, men skálamenn vóru ikki sørt óhepnir at tapa dystin.

### Heimasigur á Mølini

Á Mølini á Eiði hittust hini bæði liðini í bólki 2, EB-Streymur og VB. Heimaliðið byrjaði betur, og tá ið fyrri hálvleikur var okkurt um hálvrunnin legði EB-Streymur seg á odda. Rumenin Sorin Anghel spældi hegnisliga Sonna L. Petersen leysan, og runavíkingurin sveik ikki og skoraði til 1-0.

Í seinna hálvleiki gekk leikur eitt sindur meiri javnt á, men um miðjan seinna hálvleik økti heimaliðið um leiðsluna. Vælleikandi Hans Pauli Samuelsen sendi ein góðan bólt inn um verjuna hjá vágbingum til Sorin Anghel, og rumenin skeyt bóltin millum beinini á Bjarna Johansen, og so var felagsliðið á odda 2-0. Vágbingar fingu minkað um munin nakað fyri leiklok, men tað var ikki nóg mikið, og tískil fekk EB-Streymur síni fyrstu stig í steypakappingini.

HB er nú einsamalt á odda í bólkinum við fullum stigatali, men enn hava meistararnir ikki víst nakað sannførandi spæl. Gamaní er nakað av nýggjum fólki komið til, men so stórar eru broytingarnar á liðnum heldur ikki. EB-Streymur og VB hava bæði trý stig, meðan Skála enn einki stig hevur. Komandi vikuskifti skal HB til Vágs, meðan EB-Streymur og Skála hittast.

Skála-HB 0-1 (0-1)
0-1 Hans á Lag

EB-Streymur-VB 2-1 (1-0)
1-0 Sonni L. Petersen
2-0 Sorin Anghel
2-1 Milan Kulic